# Útboð

## Viðvíkjandi trygging av akførum hjá landinum

September 2020

# Innihald

1 Innleiðing ... 3
2 Útbjóðari ... 3
3 Vavi á útboði ... 3
4 Tíðarætlan ... 3
5 Mannagongd og krøv ... 4
5.1 Krøv til tilboð ... 4
5.1.1 Akfarslisti ... 4
5.1.2 Sáttmálalong ... 5
5.1.3 Tryggingarskjøl og rokningar ... 5
5.1.4 Høvuðsforfall ... 5
5.1.5 Uppsøgn av tryggingum ... 5
5.1.6 Viðstøða ... 5
5.1.7 Vekt ... 5
5.2 Fyrivarni, alment innlit og ogn ... 6
5.2.1 Fyrivarni ... 6
5.2.2 Alment innlit ... 6
5.2.3 Ogn ... 6
6 Spurningar til útboðstilfar ... 6
7 Úrslit av útboð kunngjørt ... 6

# 1 Innleiðing

Við hesum skriv ynskir Gjaldstovan við Keyp Landsins, at biðja um tilboð uppá tryggingar fyri øll akfør hjá landinum. Akførini eru tey, ið eru fevnt av kravinum um ábyrgdartrygging sambært ferðslulógini.

Sáttmálakrøv síggjast í útboðstilfarinum saman við fylgiskjølum.

Útboðið verður gjørt sambært "Rundskriv nr. 9003 frá 1. Juli 2019 um keyp av vørum og tænastum".

Útboðstilfarið inniheldur aftrat hesum skjali, eisini skjølini

- Fylgiskjal A – "20200918 - Uppskot til rammusáttmála - akfarstryggingar"
- Fylgiskjal B – "20200918 - Tilboðsvar – akfarstryggingar"

Sáttmáli verður gjørdur við ein veitara við støði i uppskoti til rammusáttmála.

# 2 Útbjóðari

Útbjóðari er Gjaldstovan við Keyp Landsins. Kontaktpersónur er Kim Hansen, Fulltrúi, kim@gjaldstovan.fo, +298 281 581.

# 3 Vavi á útboði

Útboðið viðvíkur øllum tryggingum, ið eru knýttar at akførum, ið eru fevnd av ábyrgdartrygging sambært ferðslulógini.

Sambært "Runskriv nr. 9000 um tryggingarviðurskifti landsins" eru neyðsendarakafør einastu akførini, ið skulu kaskotryggjast, tó bert tey fyrstu trý árini. Tað eru tó fleiri akfør hjá landinum, ið t.d. hava kasko- og føraratrygging. Hetta útboð ger tó onki við at broyta uppá hesi viðurskifti. Tað merkir at ongin fulnaður skal broytast á galdandi tryggingum.

# 4 Tíðarætlan

| | |
|---|---|
| Útboð sent til føroysku tryggingarfeløgini | 18. sept. 2020 |
| Spurnaðafreist | 2. okt. 2020 |
| Tilboðsfreist | 9. okt. 2020 |
| Avgerð og kunngerð av vinnara | 16. okt. 2020 |
| Rammusáttmálið byrjar | 1. nov. 2020 |

# 5 Mannagongd og krøv

Tilboð írokna fylgisskjøl skulu sendast umvegis teldurpost til kim@gjaldstovan.fo.

## 5.1 Krøv til tilboð

### 5.1.1 Akfarslisti

Fylgiskjal B – "20200918 - Tilboðsvar – akfarstryggingar" innheldur teir upplýsingar vit hava megnað at útvega. Upplýsingarnir vit hava eru frá vegskattaskipanini á Gjaldstovuni. Í nøkrum førum er talan um upplýsingar vit hava frá Akstovuni.

| Teigur | Navn | Lýsing |
|---|---|---|
| A | NUMMARPLATA | Nummarplátan á akfari. Nøkur akfør hava navnaplátu, og her kenna vit ikki nummarplátuna, ið liggur aftanfyri |
| B | LASTAR | |
| C | VEKT | |
| D | MERKI | |
| E | MODEL | |
| F | TEKSTUR | Drívkraft |
| G | FYRSTA_SKRASET_DATO | Fyrstuferð akfarið er skrásett, tvs. aldurin |
| H | SKRASET_DATO | Akfar skrásett hjá landinum |
| I | EIG_EFTIRNAVN | Heiti á stovni, ið varðar av akfarinum |
| J | Tr.felg | Í nøkrum førum kenna vit ikki hendan upplýsingin |
| K | Trygging | Upplýsingar vit hava eru ikki teir somu frá báðum feløgunum. Í nøkrum vørum er talan um virðið NULL, tá kenna vit ikki tryggingingina |
| L | Trygging_2 | Upplýsingar vit hava eru ikki teir somu frá báðum feløgunum. Í nøkrum vørum er talan um virðið NULL, tá kenna vit ikki tryggingingina |
| M | Not_VS | Ikki partur av vegskattaskipanin hjá Gjaldstovuni, umframt akfør vit hava funnið fram til umvegis Akstovuna |
| N | Akfarslag_Akstovan | Akfar er skrásett hjá Aktstovuni sum almennt akfar |
| O | Gjald fyri Ábyrgd | Her skal gjald fyri ábyrgd setast inn fyri hvørt akfar. Talan er um øll akførini |
| P | Gjald fyri kasko | Her skal gjald fyri kasko setast inn fyri hvørt akfar, ið hevur slíka trygging. Um tað eru ivamál, so set upphæddina inn í nýggjan teig og viðmerk í annan teig. |
| Q | Gjald fyri førara | Her skal gjald setast inn fyri føraravanlukku. Talan er um øll akførini. |
| R | Onnur gjøld | Eru aðrar tryggingar knýttar at akfarinum, so set upphæddina inni her. |
| S | Viðmerkingar | Hava tit viðmerkingar ella upplýsingar, ið tit meina við hava brúk fyri at fáa kunnleika um, so set inn her. |

Fylgiskjal B – "20200918 - Tilboðsvar – akfarstryggingar", **skal** fyllast út við teimum upplýsingum, ið mangla. Tað er kollonurnar, O,..,S. Allar upphæddir írokna MVG.

Hevur tilboðsgevari brúk fyri fleiri teigum, so er ber til at seta inn, og skriva eina viðmerking um innihaldið.

### 5.1.2 Sáttmálalong

Rammusáttmálin fyri tryggingar av akførum skal vera ein sáttmáli við gildistíð á 2 ár við møguleika fyri leingjan á 1 ár. Gjøldini skulu tískil avspegla hetta.

### 5.1.3 Tryggingarskjøl og rokningar

Stovnarnir vara sjálvir av gjøldum og tryggingaskjølum. Tað stendur tó veitari frítt um hann ynskir at talan skal vera um eitt tryggingarskjal (flådepolice) ella fleiri.

Um talan er um eina ella fleiri rokningar avgerð veitari sjálvur, men krav verður sett um, at frámerki er, ið ger tað møguligt at sprorføra rammuasáttmálan í elektronisku rokningaverkgongdini hjá Gjaldstovuni.

### 5.1.4 Høvuðsforfall

Høvuðsforfall á tryggingarskjali/skjølum, skal vera 1. januar.

### 5.1.5 Uppsøgn av tryggingum

Velur man at lata inn tilboð, so góðtekur man, at øll tryggingarskjøl fevndar av rammusáttmálanum eru uppsøgd til næsta høvuðsforfall. Vinnari av tilboðnum, skal ikki hava aðra heimild fyri at yvirtaka tryggingaskjølini.

### 5.1.6 Viðstøða

Innlatin tilboð skulu standa við í 6 mðr. eftir at tilboðsfreistin er farin.

### 5.1.7 Vekt

Prísurin vektar 100%.

Fæst ikki semja um rammusáttmála kann útbjóðari vraka innkomin tilboð.

## 5.2 Fyrivarni, alment innlit og ogn

### 5.2.1 Fyrivarni

Tann, ið letur inn tilboð eigur at hugsa um fyrivarni í mun til útboðstilfarið. Eitthvørt fyrivarni viðførir at úbjóðari kann vísa burtur innlatið tilboð.

### 5.2.2 Alment innlit

Tann, ið letur inn tilboð skal eisini vera varur við, at Keyps Landsins er fevnt lóg um alment innlit: "Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina"

### 5.2.3 Ogn

Øll innlatin tilboð við fylgiskjølum eru ogn hjá Keyp Landins, og verða ikki send aftur til tilboðsgevara.

# 6 Spurningar til útboðstilfar

Um partar av útboðstilfarinum er óskynsamir ella ógreiðir, vilja vit ráða tilboðsgevarum at seta spurningar.

Møguligir spurningar skulu setast áðrenn tíðarfreistina fyri spurningum. Spurningarnir verða svaraðir skjótast møguligt, og vera sendir øllum tilboðsgaverum.

Spurningar skulu latast inn umvegis teldupost til kim@gjaldstovan.fo

# 7 Úrslit av útboð kunngjørt

Úrslitið verður sent øllum tilboðsgevarum umvegis teldupost. Og útboðið er ikki endaligt fyrr enn báðir partar hava skrivað undir rammusáttmálan.